## DAGSINS MEINING

# Á beinari kós

Í mong ár hava vit her í Føroyum tosað um at fáa framleitt svartkjaft til matna. Øll minnast royndirnar í áttati- og nítiárunum at røkka hesum máli. Bakgrundin fyri hesum royndir var tann áskoðan, at tað fór at geva størri samfelagsbúskaparligt íkast at framleiða mat til matna. Hesar royndir endaðu sum kunnugt ikki væl og royndirnar fingu nógv omanyvir seg. Tað var at kalla eingin endi á atfinningunum og alt endaði við, at tað mestsum var staðfest sum ein óreingiligur sannleiki ella ein náttúrulóg, at svartkjaftur kundi ikki framleiðast til matna. Burturúr tí tilgongdini komu nógvir búskaparligir og persónligir sorgarleikir. Tað skerst tó ikki burt, at hesar verkætlanir vóru á rættaru leið og góvu nógvar royndir, sum seinni eru kominar til góðar. Tað má vera rætta leiðin at framleiða mat heldur enn dýraella fiskafóður úr havsins proteinríkidømi. Og tað má vera rætt, at gagnýta svartkjaftin, sum er ein sera sterkur og stórur fiskastovnur, betir enn gjørt verður í dag.

Nú eru so hesar royndir við svartkjafti til matna tiknar uppaftur – fyrst við Nærabergii og síðan við Atlantic Navigator. Talan er, sum øll vita, um eitt samstarv millum JFK í Klaksvík og Aker Seafood, sum norski vinnulívsmaðurin Røkke eigur. Røkke er ein av heimsins mætastu vinnulívsmonnum. Hann hevur vunnið sær almikið ríkidømi við at reka fiskivinnu kring allan heimin. Samstarvið millum JFK og Røkke er sera áhugavert, og hetta er væl tann mest áhugaverda og realistiska royndin at framleiða mat úr svartkjafti til dato. Tað er sjálvsagt torført at spáa um hetta seinasta stigið við at vinna surimi úr svartkjafti fer at eyndast. Hinvegin kann staðfestast, at er tað nakað, sum kann fáa eina slíka verkætlan at eydnast og at bera frukt, so má tað vera sameiningin ella kombinatiónin Aker Seafood og JFK. Aker við Røkke á odda hevur kapitalin og altjóða kontaktirnar. JFK hevur fremstu serfrøði innan fiskiveiði. Føroyingar eru, sum Røkke tók til her í blaðnum í gjár, heimsins bestu fiskiog trolmenn. Hartil kemur, at JFK fyritøkan hevur sera drúgvar royndir at reka reiðaravirksmi, serstakliga trolarar. Ber tað yvirhøvur til at fáa surimiframleiðslu úr svartkjafti at bera seg og at gerast til eina varandi og burðardygga vinnu, so má tað vera við hesum samstarvinum millum Røkke og JFK.

Vit tala í Føroyum nógv um at fáa útlendskan kapital inn í føroyskt vinnulív. Partar av vinnulívs- og politiska umhvørvinum ræðast útlendskan kapital. Aðrir partar síggja útlendska luttøku í føroyskum vinnulívi sum eina bjarging í altjóðagerðini. Kappingin er hørð frá lágpríslondum. Kapitaltørvurin og tørvurin á nýskapan er ovurstórur. Føroyska fiskivinnan noyðast at finna strategiskar partnarar, og fiskivinnan á sjógvi og á landi noyðast at læra seg at liva í einum heimi, har fortreytirnar fyri vinnurakstri eru radikalt broyttar. Ein leið er at samstarva við útlendskar fyritøkur um íløgur og um rakstur. Hetta gevur fyrimunir og vansar, sum alt her í heiminum. Fyrmunirnir eru kapitalstyrki og altjóða kontaktir og samstarv um menning, keyp og um sølu. Vansarnir eru, at einki er longur, sum eitur samfelagslig fyrilit. Ein fyritøka, sum í dag er eitt trygt og gott arbeiðspláss, kann verða seld í morgin og stongd í vurmorgin. Soleiðis eru treytirnar, og mangt bendir á, at vit mugu læra at liva við broyttum fortreytum. Læra vit tað, so yvirliva vit. Læra vit tað ikki, er vandi fyri, at vit dragna afturúr og verða víst til leiklutin sum ein rávøruframleiðandi tilafturskomin tjóð í útjaraðaranum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Treytaleys umbering til Hjørdis Djurhuus

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**
*rithøvundur*



Hervið verður borin ein treytaleys umbering til Hjørdis Djurhuus, sum vísir á ein skeivleika í øðrum bindi í ævisøguni um Kaj. Eg viðgangi eisini bart út, at júst tá ið tað snýr seg um eftirnavnið hjá Hákun Djurhuus, so hevur haltað við dokumentatiónini hjá mær, og tað eri eg harmur um. Ein telefonsamrøða til kirkjukontórið hevði fingið hendan setning at ljóðað øðrvísi og rættari, hóast Djurhuus navnið ikki hevði hvorvið.

Mær varð fortalt av einum blaðstjóra, sum nú liggur í mold, og sum eg tí ikki vil nevna navnið á, at Hákun fekk sær eftirnavnið Djurhuus sum vaksin. Sum einkjan, Hjørdis vísir á í Sosialinum seinasta fríggjadag, so er hetta ikki rætt. Hákun bar ongantíð eftirnavnið Poulsen hjá pápanum Jóan Hendrik úr Skúvoy, men var doyptur eftirnavnið Djurhuus hjá mammuni Armgarð úr Áarstovu í Havn, sum var óvanligt tá.

Her má eg so sanna orðið, at lúgvi eg, so er tað logið fyri mær. Tað er gott, at Hjørdis ger vart við mítt mistak, og hetta vísir enn einaferð, hvussu týdningarmikið tað er at dokumentera viðurskiftir og ikki bara rátt lurta eftir tí, sum borið verður fram á mannatungu, ger ein tað, so eru ofta nógvir feilir í heintu.

Enn einaferð takk fyri at tygum gjørdu vart við tygum, Hjørdis og eini gleðilig jól.

# Heimsins ríkasta land ráð til menningarhjálp

**Sambandsflokkurin tekur undir við hugskotinum hjá Zakariasi Wang, um at bjóða S.T., heimsbankanum og heimsins gløggastu økonomum hendavegin at síggja, hvønn týdning ríkisfelagsskapurin hevur havt fyri Føroyar.**

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Seinastu tíðina hevur verið nógv kjakast um menningarhjálp, og nógv ymisk sjónarmið eru løgd fyri dagin. Onkur hevur ført fram, at vit eiga ikki at veita menningarhjálp, fyrr enn allir sosialir trupulleikar í Føroyum eru loystir. Hetta er tað sama sum at siga, at løtan verður ongantíð tann rætta, tí líkamikið hvussu nógv vit játta til almannamál, so verður trupult at fáa øll altíð at vera nøgd.

Samanborið við nógv onnur lond í heiminum, eru Føroyar eitt sera ríkt land. Meðan fólk í øðrum londum stríðast við at fáa fita uppá kroppin á teirra børnum, so er okkara trupulleiki, at børnini hava ov nógvan fita. Vit kunnu tí ikki rættiliga samanbera trupulleikarnar hjá okkum við trupulleikarnar út í stóru verð.

Sjálvsagt skulu vit ikki undirmeta teir sosialu trupulleikarnar sum vit hava í Føroyum. Tó kann staðfestast, at tað er munandi betri at liva í Føroyum, enn í flest øðrum londum í heiminum. Tí er tað avgjørt rætt av okkum at veita hjálp til teirra, sum hava hjálp fyri neyðini.

Í sambandi við kjakið um menningarhjálp, kundi onkur ikki lata vera við at gera fullveldismálið til part av kjakinum. Spurnartekin varð sett við, um tað var moralskt rætt at veita menningarhjálp, so leingi sum vit móttaka ríkisveitingina úr Danmark. Men hví verður hesin spurningurin reistur nú ? Hví hevur ongin sett spurnartekin við, um tað er moralskt rætt at veita til dømis útbúgvingarstuðul til lesandi, rentustuðul til sethúsaeigarar o.s.fr., meðan landskassin fær ríkisstuðul úr Danmark ? Er tað bara í sambandi við menningarhjálp, at tann moralski spurningurin hevur týdning ? Og er veruleikin ikki tann, at tað er innanfyri ríkisfelagsskapin at vit hava bygt upp eitt vælferðarsamfelag, sum hevur ráð til at veita bæði útbúgvingarstuðul, rentustuðul og nú eisini menningarhjálp? At raðfestingarnar onkuntíð kundu verið ørvísi, er ein onnur søga.

Zakarias Wang skrivar í Dimmalætting í farnu viku, at um heimurin vil fáa at vita, hvussu stuðul ávirkar eitt samfelag, so kunnu vit bjóða S.T., heimsbankanum og heimsins gløggastu økonomum at kanna, hvat ið hent er við búskapinum í Føroyum og Grønlandi ta tíð, vit hava fingið mestan stuðul av øllum heimsins londum. Hetta haldi eg vera eitt frálíkt hugskot, sum kann læra bæði okkum og onnur um tann týdning, ið samstarv millum lond hevur. Sjálvandi skulu allir serfrøðingar vera vælkomnir at síggja, hvønn týdning ríkisfelagsskapurin hevur havt fyri Føroyar.

Samstarv er vegurin fram. Vit skulu samstarva innanfyri ríkisfelagsskapin, til gagns fyri okkum sjálvi, men vit skulu eisini, saman við restini av ríkinum, fara út í onnur lond at samstarva við onnur, til gangs fyri allar partar.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.